# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Starvsdagar hjá P/F Meinhard Arge:

## Arbeitt í næstan hundrað ár tilsamans

**Fríggjadagin 8. oktober var móttøka hjá P/f Meinhardt Arge við Oyggjarvegin í Havn í samband við at trý av starvsfólkunum, tríggir mans, kundu hátíðarhalda at teir hava arbeitt í fyritøkuni í tilsamans 95 ár**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Umleið tveyhundrað fólk stukku inn á gólvið hjá P/f Meinhardt Arge seinasta fríggjadag, tá móttøka var fyri Ingibjarti Durhuus, Erhard Olsen og Erling Olson, sum tilsamans høvdu arbeitt í fyritøkuni í næstan hundrað ár

Ingibjartur Durhuus lærdi til bilmekanikara hjá Wenzel Petersen úti í Bakka, áðrenn hann kom í starv hjá Auto Service í Gundadali í 1964. Hann var í mong ár verkførari á bilverkstaðnum, og seinnu árini hevur hann havt mest við garanti av nýggjum bilum at gera. Hann kundi hátíðarhalda sín 40 ára stavsdag.

Erhard Olsen fór í læru sum bilmekanikari hjá Auto Service í Gundadali í 1974. Hann hevur øll árini arbeitt á mekanska verkstaðnum, har hann javnan hevur dagført sína vitan og verið á nógvum ymiskum skeiðum í nýggjastu tøknini. Hann kundi hátíðarhalda sín 30 ára starvsdag.

Erling Olsson byrjaði hjá Auto Service í 1979. Tá var fyritøkan flutt í nýggjan virkisbygning á Hálsi. Hann hevur arbeitt mest sum plátusmiður og lakkerari, og var hann í mong ár verkførari á tí deildini. Í dag starvast hann sum húsavørður og á mekaniska verkstaðnum. Hann kundi hátíðarhalda sín 25 ára starvsdag.

Stjórin í fyritøkuni, Finnbogi Arge, helt ein góða talu fyri teimum trimum og takkaði teimum fyri sera gott samstarv og fyri at teir, hvør á sínum øki, høvdu verið við til at ment fyritøkuna til tað, hon er í dag.




*Tríggir mans kundu fríggjadagin hátíðarhalda sínar starvsdagar hjá P/f Meinhardt Arge, her eru teir saman við stjóranum, f.v. Ingibjartur Durhuus, Finnbogi Arge, Erhard Olsen og Erling Olsson*



*Ein trúgvur Datsun/Nissan kundi, Siggert Johansen á Argjum*



*Finnbogi Arge og John Ellefsen, sýnsmaður, sum í mong ár var verkførari hjá Wenzel Petersen, sum helt til í sama bygningi*



*Tveir vetaranar í føroysku bilavinnuni, Meinhardt Arge, sum fyritøkan eitur eftir, og Sverri Mortensen, sum eisini arbeiddi í fyritøkuni*



*Jørgen Thygesen, Berner-sølumaður, millum brøðurnar Finnleif (v.m.) og Ingibjart Durhuus*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Ruben Andrésen 60 ár

Mánadagin 11. oktober fylti Ruben Andrésen í Havn 60 ár. Ruben er havnarmaður við stórum H, B36-ari og í enskum fótbólti er Chelsea hansara lið.

Í hesum mánaðinum eru eisini liðin 40 ár, síðan hann byrjaði hjá postverkinum í Havn. Hann byrjaði sum postboð, og var í nøkur ár vaktmeistari. Seinastu mongu árini hevur hann verið leiðari á pakkadeildini.

Ruben hevur sera stóran áhuga fyri ítrótti, og hevur hann havt fleiri álitisstørv innan føroyskan ítrótt. Hann hevur t.d. verið fótbóltsdómari og seinnu árini dómaraeygleiðari.

Hann hevur verið formaður í B36 og limur í Oyggjaleikanevndini, tá leikirnir vóru í Føroyum.

Eisini hevur hann verið limur í Barnaverdini hjá Tórshavnar kommunu.

Ruben er sonur Henny, f. Larsen, og Terja Andrésen, sum eisini arbeiddi á posthúsinum í Havn í mong ár.

Ruben er giftur við Oslu, f. Johannesen, úr Klaksvík. Tey eiga børnini Tommy, sum býr í Havn, og Merry, sum býr í Keypmannahavn.

Osla og Ruben eiga eisini ommu- og abbasonin, Ruben.



*Mynd: Signar Dalfoss*

### 75 ára føðingardagur

12. oktober fyllir Poul Johannus í Horni, Klaksvík, 75 ár.



### Prógv

7. okt. 2004 varð Rúni í Homrum útlærdur vvs- og ventilatiónsmotørur. Hann hevur lært hjá P/f Demic í Havn.




Tekniski Skúlin í Tórshavn:

## Prógv sum bygningssnikkarar



*Fríggjadagin 8. oktober fingu tríggir bygningssnikkarar prógv á Tekniska Skúlanum í Havn. Teir vóru Johannes Olsen, Sandavágur, læurupláss: Vatnsoyra Snikkaravirki, Kristin av Kák Joensen, Sørvágur, læurupláss: Sørvágs Snikkaravirki, Suni Andrias á Lava, Tórshavn, læurupláss: P/f BSV, Tórshavn.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dagurin

**12. oktober. Maximilianus,** deyður umleið ár 285. Pávin Sixtus II sendi hann sum trúboðara til tað, sum nú verður rópt Eysturríki. Hann varð seinni biskupur, men bleiv tikin av døgum. Hann er verndarhalgimenni hjá Eysturríki, og fleiri av keisarunum har hava borið navnið Maximilian.

Navnið merkir *hin fjølmenti.*

## Tøkk

Hjartans tøkk veiti eg tykkum, ið mintust til mín á 80 ára degnum 10. september, tit sum komu inn á gólvið, tit sum sendu blómur, gávur, fjarrit og kort, og tit sum ringdu til mín.

*Blíðar heilsanir*
**Hjørdis Poulsen**